## Suzuki Liana



Amerikanski stovnurin "Insurance Institute for Highway Safety" hevur í meira enn 30 ár granska í ferðslutrygd, og gera teir sínar egnu testir av nýggjum bilum. Í nýggjastu testunum teir hava almannakunngjørt, fekk Suzuki Liana toppkarakter, og verða teir mettir sum besta bilkeyp í sínum klassa.

*Kelda: Tíðindaskriv frá Suzuki*

## Flestir Opel



Ein kanning sum felagsskapurin "De Danske Bilimportører" hevur gjørt, vísir, at Opel er tað bilmerki, sum mest er til av í Danmark. 11,39 prosent av bilunum á donsku vegunum eru Opel.

*Kelda: Tíðindaskriv frá GM*

## Norskir stoytfangarar



Norska felagið Hydro Automotive Structures hava gjørt sáttmála við fronsku Renault bilverksmiðjuna um levering av einum stoytfangarasystemi, sum millum annað skal brúkast til ársins bil í 2003, Reanult Mégane II.

*Kelda: Norsk Hydro*

# Iveco Stralis – ársins lastbilur í 2003



*Iveco Stralis. "Årets lastbil 2003" internationalt*

**Hóast Iveco gera bæði stórar og smærri lastbilar og vøruvognar, hava teir hjá Reyni Service serliga lagt seg eftir at marknaðarføra Daily og EuroCargo-røðirnar í Føroyum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Í Danmark hava Iveco, í støddini 3,5 tons, 24,5 prosent av marknaðinum. Talan er um Iveco Daily, sum verða gjørdir sum lastbilar, vørubilar og bussar. Síðan tann fyrsti Daily kom á gøtuna í 1976, er marknaðarparturin ómetaliga nógv vaksin. Daily er ein rúmligur vørubilur sum er serliga væl egnaður til vørukoyring í býnum, við tað at hann hevur lítlan vendidiametur og harvið lættur at koma runt við, har sum ferðslan er nógv, og tronligt er at koyra.

Hjá Reyni Service hava teir serliga lagt seg eftir at marknaðarføra Daily og EuroCargo-røðirnar. Daily verða gjørdir í støddum frá 3,5 til 6,5 tons og EuroCargo í støddum frá 6,5 til 17 tons totalvekt.

Á transportmessuni í Herning, ið er frá 27. til 30. mars, hava Iveco ein stóran bás, har teir gera serliga nógv burtur úr Iveco Starlis, sum bleiv kosin sum "Truck of the Year" ella ársins lastbilur 2003 internationalt.

Ein nýggjur Iveco Daily minibussur er júst nú komin á marknaðin. Talan er um ein buss til 16 ella 19 ferðandi. Tað vil siga at við 16 sitiplássum, hevur hann eitt hampuliga stórt viðførisrúm, men hevur hann 19 sitipláss, er einki viðførisrúm. Bussurin hevur ein 2,8 litur 4 syl. Common-rail dieselmotor við 125 ella 146 hk. Hann er væl ljóðdoyvdur og góður at koyra. Eisini hevur hann framkomna bremsuskipan við ABS (Anti Blocker System), ABD (Automatic Brake Differential) EDB (Electronic Brake Distribution) og elektriskan retardara (OPT).

### Iveco C I 3 minibussur

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 2.8 litur 4 syl. diesel 92 KW (125 hk) v. Common-rail inspræning |
| Ella við: | 107 KW (146) |
| Dekkstødd: | 195/75-16 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd: | 694,8 cm |
| Breidd: | 199,6 cm |
| Hædd: | 274,5 cm |
| Oljutangin: | 90 litrar |
| Prísur: | frá kr. 554.000 |
| Søluumboð: | P/F Reyni Service<br>Vegurin Langi<br>FO- 188 Hoyvík<br>Tel. 353040 |



*Iveco Daily minibussurin innan*



*Hurðin í høgru síðu er eldrivin og fer aftur við síðuni*



*Iveco Daily 50 C I 3. Ein heilt nýggjur minibussur við upp til 19 sitiplássum*





*Sum støðan veit Torkil við Sandá ikki, hvørja lagnu hansara ætlaða bygging av einum íbúðarblokki fær á hesum økinum við Marknagilsvegin.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Óvist við íbúðarblokki

**Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu skal nú kannað eftir, hvat ber og ikki ber til við Marknagilsvegin**

BYGGING
*Heri á Rógvi*

Í Sosialinum í gjár stóð at lesa um eitt byggimál við Marknagilsvegin. Sp/f Àtak byggimeistari, sum Torkil við Sandá eigur, ætlar at gera ein íbúðarblokk á matrikul nr. 1102 a við Marknagilsvegin.

Talan er um ein bygning, sum skal hýsa fimtan íbúðum – fimm á hvørjari hædd. Hæddin á bygninginum skal eftir ætlan verða tíggju metrar.

Støðan er nú tann, at endaliga byggiloyvið ikki er latið. Sostatt er arbeiðið ikki steðgað, men heldur ikki komið ígongd.

Sjálvur heldur Torkil við Sandá viðgerðina vera løgna.

– Eg havi fingið øll loyvi higartil, og tað var umsitingin sjálv, sum skeyt upp, at eg skuldi byggja í trimum hæddum, sigur Torkil við Sandá, sum sigur seg hava fylgt øllum ynskjum, kommunan er komin við.

Hann hevur keypt økið fyri eina millióna upphædd, og hann hevur nýtt fleiri hundraðtúsund krónur til at gera klárt, teknigar og annað.

Hann ger greitt, at verður byggingin steðgað, so fer hann at krevja endurgjald frá kommununi.

Hann hevur fingið principielt byggiloyvi frá býráðnum, men tað er óvist, hvussu hetta skal tulkast.

Jan Christiansen, borgarstjóri, metir, at eitt principielt byggiloyvi merkir, at málið er liðugt viðgjørt politiskt, og tann, ið ætlar at byggja, skal bert halda seg innanfyri tær ásetingar, sum eru galdandi.

Torkil við Sandá skilir tað soleiðis, at hann hevur fingið loyvi til at byggja bygningin í trimum hæddum, men kann ikki fáa endaligt loyvi fyrr enn allar tekniskar ásetingar við kloak og øðrum eru lagdar fyri býráðið.

Torkil heldur ikki, at ein tíggju metrar høgur bygningur er nakað serliga stórt.

– Hetta er ikki størri enn eini vanlig sethús í trimum hæddum við kjallara, og tann niðasta hæddin liggur undir partvíst undir vegnum, sigur Torkil við Sandá.

Íbúðirnar verða eftir ætlan 62 fermetrar til støddar og lyklaklárar við øllum hvítvørum, gólvi og málað.

Málið liggur nú hjá umsitingini í býráðnum. Ein borgari hevur sent býráðslimunum eitt skriv, har spurnartekin verða sett við byggingina. Spurt verður eftir, hvat slag av øki talan er um. Sambært umsitingini hjá býráðnum er talan um eitt C 3 øki, og har verður loyvt íbúðarbygging av hesum slag.

Sambært borgarstjóranum er eingin samtykt, ið forðar einum tíggju metrar høgum bygningi á økinum, men korini skal umsitingin kanna málið, og tað er framvegis óvist, hvør lagnan verður.

– Umsitingin fer nú at kanna málið. Tað eru ymisk fyrilit, ið skulu takast í sambandi við tílíka bygging, og hetta vilja vit nú fáa greiðu á, sigur Jan Christiansen.

Byggi- og býarskipanarnevndini hjá býráðnum hevur viðgjørt málið, men kom ikki til nakra niðurstøðu. Málið skal eftir ætlan á skránna aftur á næsta fundi.

### Gott skil

Tórshavnar kommuna hevur ferð eftir ferð verið frammi í fjølmiðlunum í sambandi við bygging og gloymdar samtyktir,

– Av tí, at mann hevur meira enn 150 byggimál um árið, og trýstið er størri enn í áttatiárunum, so hendir tað, at nakrir feilir verða gjørdir, sigur Jan Christiansen.

Og hann hevur fult álit á sínari umsiting og kveistrar allan iva til viks.

– Her er gott skil á, sigur Jan Christiansen.

### Fakta

**Gongdin í málinum**

- Í august 2002 keypir Sp/f Àtak matrikul 1102 a við Marknagilsvegin.
- 30. oktober 2002 fær Sp/f Átak útgravingarloyvi frá Tórshavnar kommunu.
- 12. november 2002 verður principielt byggiloyvi givið til bygging av íbúðarblokki av Byggi- og býarskipanarnevndini hjá Tórshavnar býráð.
- 15. november 2002 fær Sp/f Átak loyvi at lagra grót á matr. nr. 1102 a
- 14. mars 2003 fáa býráðslimirnir eitt skriv frá borgarar, sum setir spurnartekin við ætlanirnar byggja íbúðarblokk á økinum.

**Goymslulærlingur**

P/F Wenzel søkir eftir læringi til eykalutagoymslu okkara.

Starvið umfatar í høvuðsheitum sølu av eykalutum og annað goymsluarbeiði.

**Førleikakrøv:** Koyrikort er neyðugt.
Fyrimunir eru at hava HH ella FHS, men er tó ongin treyt.

Lærutíðin tekur úr 2 árum uppí 4 ár, alt eftir hvørja skúlagongd ein hevur.

Skúlagongdin í lærutíðini er í Danmark.

Umsókn saman við møguligum prógvum verður at senda til:

P/F Wenzel • Akranesgøta 5
Postboks 3043 • 110 Tórshavn
Att: Oddmar Ørvarodd.

Freist at søkja er 28. mars

Eru fyrispurningar, eru tygum vælkomin at ringja 354613 og spyrja eftir Oddmar, ella senda teldupost til: oddmar@wenzel.fo